# Havnarferðin hjá Ommediddu

**Fyri 65 árum síðani – 21. desember 1946 – hevði Hans M. Jacobsen hesa frásøgn í Dimmalætting. Vit prenta hana soleiðis, sum hon var orðað og skrivað ta ferðina**



*Havnin áðrenn aldarsskiftið til 1900-talið*

Ommedidda er gomul nú, hon er 83 ára gomul, men enn er hon nokkso fitt, hon bæði karðar og spinnur og gongur úti upp í millum. Rúmt hálvt ár herfyri datt hon oman, og tá væntaðu øll, tað fór at verða hennara endi, men tað var ikki. Hon hevði verið uppi á loftinum eftir rokkinum og stránum, tí hon ætlaði sær at fara at spinna; men á veg niður aftur av loftinum við rokkinum í aðrarið hondini og stránum í hinari, datt hon ovast av stiganum og meiddi seg; men sum fyrr sagt, enn fæst hon við at spinna og orkar at ganga úti. Hon er gomul genta. Nú er tað kanska onkur, ið ynskir at vita, hvør henda ommudidda er, og sjálvsagt hevur hon annað navn; men tað yngra fókið á Kirkju kallar hana bara ommudidda, men eldri fólk í grannabygdunum vilja komast betri við, hvør hon er, tá vit nevna hana Ebba suðuri í Túni. Hon hevur alla sína tíð búð á Kirkju í Fugloy.

Eg spyrji Ommediddu, um hon ofta var í Havn í sínum yngru árum, men hon sigur, at hon bert eina ferð hevur verið í Havn, og tá var hon 28 ára gomul. Eg vil nú læta ommudiddi greiða frá havnarferðini, hvussu hon ferðaðist til Havnar og aftur til Fugloyar. Hon sigur soleiðis:

"Tað var mitt um summarið, og ein kona á Kirkju og eg høvdu lagt ferðalag til Havnar. Tá í tíðini var ikki so liðiligt at ferðast úr Fugloy til Havnar sum nú. Toftamenn vóru í Fugloy og ferðaðust, og við teimum fóru vit av Kirkju inn á Norðtoftir. Har lógu vit nátt; vit gistu "undir Grót-húsinum" hjá Katrinu í Depli. Av Norðtoftum fylgdi Jóanis undir Grót-húsinum okkum til Árnafjarðar. Har fóru vit inn til Hanus í Glasstovuni, og hann fylgdi okkum á Svínoyagjógv og oman á slætt, og tá vit vóru komin oman á slætt, funnu vit sjálvar til Oyrar. Har gistu vit uppi í stovu (í Uppistovu). Dagin eftir førdu Oyramenn okkum úr Klakksvík og til Lorvíkar. Tá vit komu inn í Bø, fingu vit at vita, at hin gamli skúlalærarin nettup var farin til Lorvíkar at ferðast við konu sínari; tá vóru vit so harmar, at vit vóru ov seinar av Oyri at sleppa í fartin við honum. Í Lorvík lógu vit so nátt, og har gistu vit hjá Ólavi á Toftanesi.

Har var ein sovorðin rúgva av konufólki saman komið, tríggjar konur vóru í húsinum, og kona læraran í Klakksvík, ið var systur bóndans og ein dóttur bóndans, ið gift var á Eiði, vóru komnar at ferðast. Har afturat vóru komnar har at taka ímóti konu lærarans úr Klaksvík ein systur bóndans og ein dóttur hansara, sum báðar búðu í Lorvík.

Dagin eftir fóru vit til gongu um Lorvíksfjall. Ein arbeiðskona har í húsinum fylgdi okkum upp á, og so gingu vit einsamallar.

Í Norðragøtu vóru vit ongastaðni inni, men í Syðrugøtu fóru vit inn niðri við Hús, og har vóru vit settar til borðs í einari stovu, har merki sóust eftir, at torðan hevði sligið niður. So fóru vit aftur til gongu, og tá íð vit komu til Solmundarfjarðar, fóru vit inn hjá einum manni, sum æt Per. Har vóru vit eisini til borðs, og so fóru vit aftur til gongu út til Toftar. Har hildu vit til á Hellu. (Tann eldra konan har í húsinum var systkinabarn við pápa mín).

Morgunin eftir fór ein maður av Toftum, ið æt Jens Kristian, og kona hansara til Havnar, og so sluppu vit við í bátin við teimum. Pól uppi á Hellu á Toftum, ið eisini var við í ferðini, fylgdi mær til hús, har sum eg ætlaði at halda til í Havn. Beiggi mín gekk í lærarskúlan, og hann helt til hjá einari konu, ið æt Elspa Sofía, og har gisti eg so átta dagar.

Úr aftur Havn fóru vit so til gongu niðan til Hoyvíkar, og har sluppu vit so í bátin við Hanusi á Glyvrum, ið hevði verið í Hoyvík og vitjað abbabørn síni har. Tá íð vit komu til Glyvrar, beyð Hanus okkum til hús við sær, og har gistu vit so ta náttina.

Morgunin eftir fóru vit aftur til gongu, og táið vit komu til Sølmundarfjarðar, fóru vit inn á gólvið hjá Peri; tey vóru óføra blíð, og Per kom at fylgja okkum ávegis, tá vit aftur fóru til gongu. So gingu vit líka til Lorvíkar, og tá íð vit komu har, ætlaðu lorvíkingar sær at fara at dyrgja á Galvinum, og so sluppu vit í bátin við teimum; teir settu okkum upp á land á Galvinum, og haðani gingu vit so til Syðradals. Men táið vit komu til Syðradals, var so seint, at alt fólkið longu var farið til songar, og einki fólk kendu vit har á plássinum. Eg helt tá við hina, at tað var beinast, at vit fóru inn í tey størstu og prúðastu húsini, sum vit sóu, tí um vit komu so seint til fólk at biðja um hús, hvar trongligt var við sengur, kundi tað koma illa við. Vit so gjørdu, sum eg hevði rátt til. Vit fóru so inn hjá Óla bónda á Syðradali, og væl vit vóru móttiknar. Vit søgdu, hvussu tað bar til, at vit nettup komu inn hjá teimum, og konan í húsinum helt fyri, at tað var rætt hugsað av okkum.

Dagin eftir fóru vit til gongu heim til Húsar, og haðani sluppu vit til Kunoyar við Hanusi á Heyggi, íð fór at føra konusystir sína til Kunoyar. Í Kunoy lógu vit eina nátt; eg helt til hjá Hans Jákup í Árnastovu, og hin helt til í Innarstovu.

Dagin eftir fóru vit til gongu til Skarðs, Ólavur í Innarstovu fylgdi okkum. Vit gingu upp um og oman aftur Skarðsgjógv. Á Skarði hildu vit til hjá Jóanis á Skarði; har lógu vit eina nátt, og dagin eftir fóru Skarðsmenn norður í Sund (Hvannasund) til handils, og við teimum fóru vit norður í Sund. Árant á Skarði var ein, íð fór við; hann kom við einum leypi av torvi. Hann segði, at hann skuldi hava hann við til tinganest til systurdóttir sína, íð var gift á Oyrini (Norðdepli).

Í Sundi lógu vit so ta náttina, og dagin eftir førdu Sundamenn okkum til Fugloyar. Og so var m ín Havnarferð komin at enda".

# Frá Ommudiddu og til samfelagið hjá Giddens

**Hugleiðingar um hvussu samferðslan hevur ment seg í stórum lopum, og um onkra styrkina, sum tíðin, tá Ommudidda ferðaðist av Kirkju og til Havnar, hevði framum gerandisdagin og ferðinginaá okkara døgum**

NÝGGJÁRS-HUGLEIÐINGAR

*Jóannes Hansen*

Søgan um Havnarferðina hjá Ommediddu er sera áhugaverd á so mangan hátt, og ein sovorðin søga fær hugsanirnar at ferðast skjótt og víða. Tað er Hans Mikael Jacobsen, sum hevur skrivað. Hann var læraralærdur, og hann var skrivandi maður. Eftir hann liggja nógvir sálmar, og nakrir teirra eru í sálmabókini. Sonur hansara, Jákup á Fløtti Jacobsen, sum er løgreglumaður í Klaksvík, gav í 1979 út eitt savn við tilfari eftir pápan. Talan er um søgur og sagnkent tilfar. Bókin eitur Høvdið uppundan, sum er heitið á einari av søgunum. Tað er serliga sermerkt, at bókin er prentað í hondskriftini hjá honum, sum skrivaði.

Hans Mikael Jacobsen leyk prógv á Føroya lærarskúla í 1929. Jákup veit at siga um pápan, at hann eitt stutt skifti var vikarur á Tvøroyri fyri Petur Mohr Dam. Veturin 1929/1930 var hann eitt skifti lærari í Svínoy, og í 1930 varð hann settur í starv í Fugloy. Hans Mikael var bara lærari í tíggju ár. Í 1940 legði hann frá sær. Hann hevði fingið tuberklar. Tá Hans Mikael búsettist á Kirkju, fór Jóhanna Katrina Joensen úr Hattarvík at halda hús hjá honum. Tey giftust og fingu sonin Jákup.

Í 1952 fluttu Hans Mikael, konan Jóhanna Katrina og sonurin Jákup til Klaksvíkar. Tey búsettust á Gørðum. Jákup sigur, at foreldrini keyptu húsini frá Kokka Magnusi. Soleiðis varð Magnus Fuglø nevndur. Hann fór tá til Grønlands at kanna umstøðurnar fyri landbúnaði í Suðurgrønlandi. Jógvan Arge hevur skrivað um hetta í bókarøðini Teir tóku land, bind 4. Hans Mikael doyði 6. august í 1960. Hann var føddur nýggjársdag í 1901.

## Ommudidda

Ebba suðuri í Túni, sum Hans Mikael sigur, var hon, sum fugloyingar allir nevndu Ommudiddu, var sambært Tey byggja land 1 hjá Símuni Hansen dóttir Malenu og Jákup suðuri í Túni.

Stóri trupulleikin, sum m. a. hevur havt við sær, at útoyggjaálitið varð skrivað, og at útoyggjafelag er sett á stovn, er, at unga fólkið støðast ikki á útoyggjunum. Tær eru um at avtoftast.

Tá Ommedidda var upp á tað besta, vóru tíðirnar øðrvísi. Bara eitt av systkjunum hjá henni flutti av oynni. Tað var Gulak Jacobsen, sum var yngstur. Hann lærdi til lærara og fór síðani niður at lesa til prest. Hann varð prestur í Hvalba. Hini seks systkini búleikaðust úti í Fugloy. Men burtursæð frá Gulaki, var tað bara hjá einari av systrunum, at eftirkomarar spurdust burturúr. Umframt Ebbu vóru Ólavur og Anna Sofía ógift. Ein genta, Olevina Concordia, doyði ung. Elsti sonurin Pól giftist, men tey vóru barnleys.

Gulak hevði konu av Nesi, og tey fingu trý børn. Anna, sum var næstelst av systkjunum, giftist við Nikláa Poulsen norðan úr Stovu, og tey fingu sjey børn.

Hans Mikael sigur frá Ommudiddu, at hon var 28 ára gomul, tá hon gjørdi einastu ferðina til Havnar. Sambært Símun Hansen var hon fødd í 1863. Hans Mikael Jacobsen sigur, at í 1946 var hon 83 ára gomul. Hetta passara væl saman, og tað vil siga, at hon hevur verið í Havn stutt eftir 1890.

## Ikki so øgiliga langt burtur

Hjá einum, sum fleiri ferðir um vikuna ferðast um dalar og fjøll og firðir og sund, hevði tað ikki borið til at liva og virka í nútíðarsamfelagnum undir korunum, sum tey vóru, tá Ommudidda fór til Havnar. Men tað eru ikki so ógvuliga nógv ár síðani, at tað fóru tveir dagar til eina ferð úr útoyggj og til Havnar og hjá havnarfólki at ferðast til bygdirnar eystan Múlan.



*Hans Mikael Jacobsen*

Undan at mjólkaforsýningin í oktober 1967 fekk Trónd at røkja skálafjarðarsiglingina og ferjan, sum nú eitur Ternan 1, kom, var óhugsandi við styttri ferðatíð, um almennu farleiðirnar skuldu nýtast. Ternan 1 kom valdagin, 7. november, í 1970. Fyri ta tíð sigldu bátarnir hjá pf. Hugo Gardar um Leirvíksfjørð. Túrarnir hjá Polaris, Barsskor (røkir framvegis sambandið í Kalsoynna!) og frá miðskeiðis í seksti árunum Britons Pride og Gardar (gamla Vesturleið, sum frammanundan hevði siglt millum Vágarnar og Havnina) vóru fáir.

Beinleiðis ferðasambandið millum Klaksvíkina og Havnina var suðureftir á morgni og norðuraftur eftir døgurða við Britons Pride (sigldi við farmi og fólki frá 1936 og til eftir at Pride kom í 1961). Smiril silgdi kring allar Føroyar, og fram ímóti sjeyti árunum røktu eisini Smyrli, sum í 1967 fór av bakkastokki á Tórshavnar Skipasmiðju og seinni fekk navnið Dúgvan, og Smyril, sum varð keyptur úr Danmark í 1975, sambandið til Klaksvíkar.

Úr Klaksvík og eystur um slapst við Immanuel. Sambært Postsøguni hjá Vilhelm Johannesen setti Olaf á Stongunum Immanuel í sigling við posti, farmi og ferðafólki í 1916 – ella eina fjórsðingsøld eftir at Ommudidda hevði gjørt sína Havnarferð.

Í 1959 yvirtók Strandferðslan siglingina við nýggja Másanum, sum var bygdur á Tórshavnar Skipasmiðju. Eftir at tunnlarnir eystur um fjall komu í 1967 hevur ferðin verið ómakaleysari, enn hon var frammanundan. Tá skuldi leggjast at í Haraldssundi. So lá postbáturin úti fyri Múla, sum vit í heyst hava hoyrt so nógv um í væl upphugsaðum og áhugaverdum útvarpssendingum, meðan fólk, fæ og frakt við lítla báti varð róð til og frá. Úr Múla varð farið yvir um. Undir Leiti vóru viðoyingar avgreiddir.

Petur Hágberg hevur í Hugbirtingum eina góða lýsing av, hvussu tað var, tá postbáturin legði at. Hansara íblástur man vera frá 1920unum, men umstøðurnar vóru ikki stóert øðrvísi fjøruti ár seinni:

"Menn rokast umborð og á bryggjuni. Dreingir og hundar koma rennandi oman eftir gøtuni fyri at vera við til dagsins stórhending. Tómir mjólkadunkar verða langaðir í land, meðan menn taka ímóti fullum dunkum, sum nokk eru tungir at lyfta, tíat menninir rodna í andlitinum. Okkurt fólk fer í land, og onnur koma umborð og veittra dúgliga, táið báturin fer frá aftur. Hetta hendir fleiri ferðir", sigur Petur.

Múlin og Múla, Leitið, Immanuel, Másin, lítli bátur, Olaf og Eliesar í Múla, Hans Jákup á Brekkumørk og aðrar viðoyingar, Fríðrik á Másanum, Dánial Jákup úti á Oyri, Bei í Búðunum og Sofus á Dalinum. Tá hetta kemur fram í huganum, so er tað ikki so langt burtur, at sjóverkurin hevur hug at spøkja! Hesir fýra síðst nevndu mannaðu Másan frá tí at hann kom í 1959 og inntil Ritan og Ternan, sum tá sigldi fyri Mjólkaforsýningina, rendu saman uttan fyri Molan í Havn í 1968. Tá varð Ritan vrak, og Másin varð tikin frá fugloyingum og svínoyingum og settur í sigling um Skopunarfjørð.

Og so varð lagt at í Norðdepli og á syðru lendingini í Hvannasundi, har Niels í Buð stóð klárur at taka ímóti, áðrenn lagt varð tvørturum til Svínoyar og Fugloyar.

Systkinabarnið, Heri Joensen, hugleiddi jólaaftan so væl um, hvussu tað kundi gangast við sambandinum til útoyggjarnar. Tað kundu vera fleiri dagar, tá tað ikki var klúgvandi, men ofta var onkur útvegur. Um tað ikki bar til norðan fyri og heimanfyri í Svínoy, so kanska tað gekk í Urðarrók ella í Kleivini. Náttúruviðurskiftini gjørdu og gera, at fugloyingar vóru og eru meiri avskornir, enn svínoyingar vóru og eru.

## Góða sambandið

Tá Hans Mikael Jacobsen upp undir jól fyri 55 árum síðani setti frágreiðingina um Havnarferðina hjá Ommudiddu í Dimmalætting, hevði ferðasambandið hjá svínoyingum og fugloyingum eftir tátíðar viðurskiftum verið gott í nøkur ár. Umframt Immanuel mánadag, mikudag og fríggjadag fingu teir vitjan av bæði Britons Pride og Streymi.

Frá tí at Kjølbro setti Britons Pride í sigling við farmi og fólki í 1936 og inntil krígsbyrjan, var hon hvønn mikudag eystanfyri Múlan. Farið varð av Klaksvík, eftir at Pride var komin aftur úr Havnini. Tí var ofta seint, tá teir komu til Fugloyar og Svínoyar, men tað slapst sama dag úr Havnini og í útoyggjarnar norðanfyri.

Mjólkaforsýningin átti Streym. Høvuðsrutan var úr Havnini og vestureftir, men fríggjadag sigldu teir norðureftir. Tá var síðsti steðgur í Fugloy og Svínoy og so beinleiðis til Havnar.

Eftir at Streymur og Britons Pride vóru givin við hesi siglinini, høvdu útoyggjafólkini bara Immanuel at dúva uppá. Ferðasambandið er títtari nú, enn tað var, fyri einari hálvari øld síðani. Tyrlan vitjar tríggjar ferðir um vikuna, meiri enn 41 ára gamli og ótíðarhóskandi Másin vitjar hvønn dag, og um sumrarnar ger hann tríggjar dagar tveir túrar hvønn dagin. Men tað er ikki nóg gott, at fugloyingar og svínoyingar ikki fáa leygardagsbløðini fyrrenn mánadag. Serliga tá hugsað verður um, at tá leygardagsbløðini koma til Svínoyar og Fugloyar, hava tey í største partinum av landinum havt møguleika at lesa í teimum í meiri enn hálvt triðja samdøgur!

## Bestu íløgurnar

Tá kreppan frá fyrrapartinum av hálvfemsunum leikaði upp á tað mesta, kom tað meiri enn so fyri, at danir fingu varpað yvir seg og kundu lesa í bløðunum um, hvussu oyðslutir føroyingar høvdu verið við íløgum í samferðsluna. Flestu føroyingar munnu vera samdir í, at vegirnir, tunnlarnir, ferjulegurnar og hvørt av sínum – fyri at nýta eina vending hjá Karl hjá Talisi og Høgna Hoydal! – hava verið vælsignilsir og standa eftir sum bestu íløgurnar, sum vórðu framdar í sjeyti og áttati árunum.

Eysturoyggin og Streymoyggin eru vornar eitt øki. Fyri tredivu árum síðani var talan um isolerað bygdaløg, sum høvdu einki ella bara eitt eiti av vegasambandi. Ágóðin av at bygdirnar vóru grannar á somu oyggj var evarska lítil. Tær lógu sum perlur á einum snóri, og mesta ferðslan gekk fyri seg – sum hon gjørdi á døgunum hjá Ommudiddu – eftir sjónum.

Nú ber væl til at búgva í Vestmanna og at arbeiða í Fuglafirði ella at búgva á Toftum og at arbeiða í Havnini ella í Klaksvík. Um ikki so langa tíð verða Vágarnar – eisini gásadalsfólk – og helmingurin av Norðoyggjunum knýttar upp í fasta sambandið.

Spurningurin verður so, hvussu full nytta skal fáast burturúr stóru íløgunum,

*Framhald á síðu 22*